## Cech ónøgdur

Chelsea-málverjin, Petr Cech, var alt annað enn nøgdur um, at hann fekk reytt kort, tá Chelsea heldur óvæntað tapti 3-1 móti Wigan leygardagin. Cech varð rikin av vølli, tá dómarin bríksladi fyri bortssparki, sum Wigan skoraði til 2-1 uppá, og hetta var málverjin alt annað enn nøgdur um. – Brotssparkið var sera hart dømt, og eg varð bilsin um at fáa reytt kort, tí eg var ikki seinasti maðurin, skrivar Cech á heimasíðu sínari.



## Tjaldur-StÍF í dag

Seinasti dysturin í fyrsta umfarinum av Sunset-kappingini í hondbólti verður í Runavík klokkan 19 í kvøld. Tá taka meistararnir úr Tjaldri móti StÍF, sum í ár veruliga tykist ætla sær móti tindunum. StÍF hevur seinastu árini miðvíst satsað upp á egnar spælarar, men í ár er liðið styrkt við tveimum rumenskum spælarum, og so er spurningurin, hvussu langt tað fer at røkka. Ein partur av svarinum fæst í øllum førum, nú tær í fyrsta dystinum skulu spæla á útivølli móti meistarunum.

# KÍ kemur sterkt aftur



24 stig – og kanska 27 – eru ikki nóg mikið hjá KÍ, sum fyri fyrstu ferð í 105 ára longu søgu felagsins skal royna seg millum tey næstbestu

Mynd: Jens Kr. Vang

**– Tað er ótrúliga skuffandi at flyta niður, tí felagið er stórt og hetta er ein ordilig strika í traditiónunum hjá felagnum. Men KÍ fer bara niður at venda og kemur uppaftur beinanvegin. Tað skal eingin ivi vera um, sigur Fríðin Ziskason, nevndarformaður í Sp/F KÍ**




Hilmar Jan Hansen

Møguleikarnir hjá KÍ fyri at yvirliva í Vodafonedeildini eru mestsum mikroskopiskir, nú bert tað seinasta umfarið er eftir. Munurin upp til B36 er trý stig og nígggju mál, so skal teoretiski kjansurin gerast reellur, skal KÍ vinna 5-0 á EB/Streymi, samstundis sum B36 tapir 0-5 fyri B68.

– Vit eru so at siga farnir í 1. deild. Tað er sjálvandi keðiligt, men sum Petur sigur, so hava liðini verið góð í ár, og tvey lið skulu niður. Vit eru so blivnir so at siga tað eina, sum er farið, tí har er øgiliga lítil møguleiki nú, staðfesti nevndarformaðurin í Sp/f KÍ, Fríðin Ziskason, tá hann eftir dystin í gjár stóð saman við venjaranum, Peturi Mohr, mitt á vøllinum í Gundadali og eygleiddi HB-fólkini, ið fegnaðust um sítt meistaraheiti.

– Undan kappingini settu vit okkum sum mál, at vit vildu brúka okkara egnu spælarar og byggja felagið upp. Samstundis væntaðu vit, at fingu vit 25 stig, so fóru vit at verða verandi í deildini. Men nú hava vit 24 stig, ið ikki røkka á mál, samstundis sum vit mugu ásanna, at skuldu vit til síðst fingið enntá 27 stig, so er tað kanska heldur ikki nóg mikið.

### HB verið best

Hóast nevndarformaðurin ikki duldi fyri, at hann var keddur um, at tað skuldi hava gingist KÍ so illa í ár, viðurkendi hann veruleikan og hevði hug at hyggja frameftir.

– Tað er ótrúliga skuffandi at flyta niður, tí felagið er stórt og hetta er ein ordilig strika í traditiónunum hjá felagnum. Men KÍ fer bara niður at venda og kemur uppaftur beinanvegin. Tað skal eingin ivi vera um. Sum tað sær út í løtuni, verða teir flestu av spælarunum hjá okkum verandi í felagnum, sigur Fríðin Ziskason.

– Hinvegin mugu vit bara ásanna, at HB hevur verið tað besta liðið, sum KÍ hevur møtt í ár, so hetta føroyameistaraheitið er fult uppiborið. Nú fara vit, men koma sterkt aftur, og kanska vit næsta ár fara at satsa upp á uppflyting og kappingina um Løgmansssteypið, so vit hava nakað gott at koma uppaftur til.

# Deildin betri enn nakrantíð

**Nú bara eitt umfar er eftir av landskappingini í Vodafonedeildini, røkist einki fyri, at tað aftur í ár eydnaðist Peturi Mohr at bjarga KÍ undan niðurflytingini, sum hevur spøkt seinnu árini**




Hilmar Jan Hansen

Hetta er annað árið á rað, at KÍ hevur sent boð eftir Peturi Mohr ímóti endanum á einum kappingarári, og í ein mánað hevur hann staðið við endan hjá klaksvíkingum. Í fjør eydnaðist at bjargað liðnum eitt triðniðasta pláss, við fimm stigum niður til eitt pláss hinu megin strikuna, men nú sær meira svart út hjá KÍ.

– Eg haldi, at deildin hevur ongantíð verið so góð sum í ár. Tað hevur ikki verið nakað vánaligt lið, men tað hevur tað verið hini árini, sigur Petur Mohr, so ikki vil tosa um, um hann møguliga skal halda fram sum venjari hjá KÍ og spæla liðið uppaftur næsta ár.

Hann ásannar, at góða byrjanin hjá HB gjørdi tað sera torført hjá KÍ at fáa nakað við sær úr Gundadali í gjár.

– Vit byrjaði óvanliga illa, og tí var tað tungt at koma afturíaftur. Og eg má viðganga, at tá teir so skoraðu til 4-0, so sá tað ikki gott út. Tá vit so komu upp á 4-2, vóru vit aftur við, men fingu so eina útvísing, og so gjørdist tað ikki meira, staðfesti Petur Mohr, sum í gjár ikki dugdi at síggja nakran serligan møguleika fyri, at KÍ skuldi yvirliva í evstu løtu.

– Vit fara at gera kappingina lidna og vilja vinna á EB/Streymi, men málúrtøkuna kenna vit. Tað verður trupult.

## Miðvikudystir næsta ár

ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



Eitt tættpakkað kappingarár í fótbólti nærkast endanum, og so skjótt síðsta bríksliðið er farið komandi leygardag, er tíðin komin at eftirmeta kappingina í 2009. Har verða óivað nógvir tættir, ið kunnu takast upp til orðaskifti, men í hesum umfari kunnu vit dvølja eitt sindur við samansetingina av sjálvari landskappingini í Vodafonedeildini, ið hevur verið meira samanstúvað, enn hon plagar.

Fyrsta landskappingarumfarið var 3. apríl og tað seinasta verður 3. oktober, og harímillum hevur so verið ein summarsteðgur, ið var styttur nokk so fitt, samanborið við undanfarin ár. Bara fýra ferðir hevur verið talan um miðvikudystir í sjálvari landskappingini, men um ólavsøkumundið og nakað fram var talan um sera tætta og harða dystarskrá hjá teimum spælarum, ið bæði skuldu spæla við í heimligu kappingini og á landsliðnum.

Hetta var so ein roynd at skipa kappingina øðrvísi, men lítið man vera at ivast í, at fleiri fara at seta spurnartekin við, um hetta nú var rætti leisturin. Ikki minst, tí ein tættpakkað dystarskrá ofta hevur hug til at ganga út yvir tey liðini og teir spælararnar, ið finnast í frægara endanum og tí næstan kenna tað sum revsing fyri sínar dygdir, at eingin munagóð hvíld finst í skránni.

Í ár hevur samansetingin av liðunum í Vodafonedeildini verið soleiðis háttað, at tað hevur verið landfast, so øll hava fingið ferðast ómaksleyst til sínar útidystir, uttan at brúka stórt meiri enn ein tíma hvønn vegin. Øðrvísi verður komandi ár, tá bæði VB/Sumba og B71 aftur teljast millum fremstu liðini, og ferjusamband er einasti ferðamøguleikin til bæði Suðuroynna og Sandoynna.

Kortini hevði verið vert hjá Fótbóltssambandinum at umhugsað møguleikan fyri, at fyrsti triðingurin av landskappingini kundi verið avgreiddur eftir fimm vikum, við bæði vikuskiftis- og miðvikudystum. Tað hevði skundað undir dystarvenjingina hjá teimum liðum, sum kanska ikki hava fingið so nógvar dystir í ofta illfýsna várveðrinum, og tí kundi dygdin í spælinum skjótari blivið so góð, sum liðini kundu ynskt sær. Tá er eisini ljósari í veðrinum og ikki so myrkt, sum tað var onkran av dystunum, ið vóru spældur um kvøldarnar hetta kappingarárið.

Eisini kundu fleiri miðvikudystir verið frá hálvum juni til hálvan juli, tá nøkur av liðunum skulu spæla europeiskar dystir, tí so høvdu tey fingið góða dystarvenjing undan±stóru avbjóðingunum, umframt at tað kundi gjørt alt lagaligari, so hvørt sum heystið nærkaðist við sínum ivaveðri, tá ein trupulleiki kann vera, at »fløskuhálsar« gera tað torført at avgreiða kappingina eftir ætlan.